


# Tíggju kappast um at verða sterkastur

**FØROYA STERKASTI** Bátar skulu lyftast, bilar togast og dekk skulu koppast, tá tíggju sterkir føroyingar kappast um rættin at rópa seg Føroya sterkasta

Eftir steðg í fleiri ár, varð kappingin um at gerast sterkasti maðurin í Føroyum hildin á heysti í fjør, tá Heri Vestergaard úr Sumba var tann stinnasti í eini fullsettari ítróttarhøll á Hálsi í Havn.

Høllin á Hálsi er eisini karmur um kappingina hesaferð, og verður hon altso hildin tann 23. juli klokkan 18.30. Atgongumerki kunnu keypast í forsølu í Kunningarstovuni í Havn ella í Yndi Fitness.

Á skránni eru seks kappingar, og teir tíggju luttakararnir hava seinastu mánaðirnar vant í høllini hjá Havnar Timburhandli, soleiðis at teir ikki eru heilt ókunnugir við tungu tøkini, sum skulu takast.

### Kappingarnar eru hesar

Lyfta ein bul upp um høvd. Max kilo
Halda tveimum bilum, ið standa á rampu, longst gjørligt
Koppa einum 311 kilo tungum dekki seks ferðir upp á tíð
Hála ein vøruvogn, sum stendur í gear, 10 metrar upp á tíð
Sleipa ein vøruvogn, sum stendur í gear, 12 metrar upp á tíð
Deadligt við 330 kg tungum báti – 60 sekund

Í steðginum spælir Uni Debess, soleiðis at áskoðararnir hava møguleika at hugna sær, meðan luttakararnir fáa luft til seinastu tríggjar avbjóðingarnar.



Heri Vestergaard verður ikki millum teirra, sum kappast hesaferð, og tí er greitt, at talan verður um nýggjan vinnara av kappingini.

### Teir tíggju, sum hava boðað frá luttøku, eru:

Sámal J Hansen
Bogi Hammer
Símun Arge
Jákup Súni Berg
Herman M Hermanssen
Gunnar Grækarisson
Finnur Poulsen
Jákup Petur Djurhuus
Torkil A Hansen
Óli Andresen



**Jón Tyril**
stjóri á G!-festivalinum

**Hvussu ert tú fyri í dag?**
- Møðin byrjar so smátt at merkjast. Men eg vænti, at onnur er meira troytt enn eg.

**Ert tú glaður fyri regn?**
- Tað er ikki so galið. Men festivalur og stormur samsvarar ikki.

**Hvør var feitasta framførslan á G! ?**
- Hamferð, Polka Bjørn og Nephew.

**Hvussu var ljóðið á spæliplássinum?**
- Vit vóru ikki fyrireikaðir til at flyta alt niðan á spæliplássið. Tað kundi verið frægari, men vit kundu ikki bera okkum øðrvísi at.

## Í MORGIN




Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og15 stig.

## MIKUDAGIN




Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

## HÓSDAGIN




Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin lot av ymsum ættum. Turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 17 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og grynnist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga suðureftir og brúgvalagið við Føroyar fer sum frálíður suðureftir.Hátrýstryggurin í landsynning úr Hvarvinum kemur spakuliga hendavegin.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 13. juli | Mánin næstur jørðini |
| 18. juli | Fyrra kvarter |
| 26. juli | Fullmáni |
| 29. juli | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 19. juli | 01:37 | 14:16 | 00:37 | 13:16 | 00:52 | 13:31 | 03:37 | 16:16 | 04:37 | 17:16 | - | 12:31 | 11:31 | - | 01:52 | 14:31 | 02:52 | 15:31 | 01:22 | 14:01 | 02:37 | 15:16 |
| 20. juli | 02:55 | 15:21 | 01:55 | 14:21 | 02:10 | 14:36 | 04:55 | 17:21 | 05:55 | 18:21 | 01:10 | 13:36 | 00:10 | 12:36 | 03:10 | 15:36 | 04:10 | 16:36 | 02:40 | 15:06 | 03:55 | 16:21 |
| 21. juli | 03:47 | 16:13 | 02:47 | 15:13 | 03:02 | 15:28 | 05:47 | 18:13 | 06:47 | 19:13 | 02:02 | 14:28 | 01:02 | 13:28 | 04:02 | 16:28 | 05:02 | 17:28 | 03:32 | 15:58 | 04:47 | 17:13 |
| 22. juli | 04:39 | 17:04 | 03:39 | 16:04 | 03:54 | 16:19 | 06:39 | 19:04 | 07:39 | 20:04 | 02:54 | 15:19 | 01:54 | 14:19 | 04:54 | 17:19 | 05:54 | 18:19 | 04:24 | 16:49 | 05:39 | 18:04 |
| 23. juli | 05:30 | 17:54 | 04:30 | 16:54 | 04:45 | 17:09 | 07:30 | 19:54 | 08:30 | 20:54 | 03:45 | 16:09 | 02:45 | 15:09 | 05:45 | 18:09 | 06:45 | 19:09 | 05:15 | 17:39 | 06:30 | 18:54 |